# Metaforisk motivir



*Sofus Poulsen millum tveir av hansara nýggju málningum. Tann høgri er ekspressionistiskur, hin vinstri er naturalistiskur.*

**Fríggjadagin 4. juli letur Sofus Poulsen upp framsýning á Smiðjuni í Lítluvík**

MÁLNINGAR
*Rógvi Borðoy*

Framsýningin letur upp klokkan 15.00, og myndirnar verða av málaranum sjálvum lýstar metaforiskar.

– Eg eri farin ígjøgnum allar tær vanligu fasurnar. Ta figurativu og hinar. Men eg noyddist inn á litirnar, sigur Sofus Poulsen aftanfyri reyða, plettuta fyriklæðinum.

Sofus Poulsen húsast á Bringsnagøtu, beint yvirav hjá Katrinu Kristiansen. Har hevur hann málað í 10 ár. Summir av málningunum eru rættiliga stórir, og teir flestu eru rættiliga bláir á at líta.

Tað verður skipað fyri tónleiki í Smiðjuni í sambandi við framsýningina. Tað er Brandur Jacobsen, sum fer at spæla klassiskan gittara fríggjadagin bæði klokkan 16.00 og 21.00.

Sofus Poulsen sigur, at tað er torført at fáa eksistensialismuna fram í Føroyum. Hann heldur fram, at tað í Føroyum hevur verið mest naturalisma orsakað av litunum og landskapinum sum heild. Hann kallar síni egnu verk fyri eitt rák, sum er farið.

-Málningalist er sum tónleikur. Alt er longu gjørt. Har eru so og so nógvar akkordir at spæla við, men alíkavæl koma nýggir sangir fram hvønn dag, sigur Sofus Poulsen.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




Veðrið leygardagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið frískar hann vindin av suðri og møguliga regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | 16 |
| Halifax | 22 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 15 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 16 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 31 |
| Malta | 36 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 32 |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1013 hPa. yvir Íslandi grynnist. Eitt annað lágtrýst, 990 hPa. yvir Suður-Svøríki grynnist eisini.




**Í dag:**
Eitt lágtrýst, 1010 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer eystureftir, seinni í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/07 kl. 06⁰⁰– 03/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,2°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 02/07 kl. 06⁰⁰–03/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 0,2 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

25. juni: Mánin longst frá jørðini
29. juni: Tendring
4. juli: Jørðin longst frá sólini
7. juli: Fyrra kvarter
10. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juli | 11.10 | 23.33 | 10.10 | 22.33 | 10.25 | 22.48 | 00.48 | 13.10 | 01.48 | 14.10 | 09.25 | 21.48 | 08.25 | 20.48 | 11.25 | 23.48 | 00.03 | 12.25 | 10.55 | 23.18 | — | 12.10 |
| 5. juli | 11.53 | — | 10.53 | 23.14 | 11.08 | 23.29 | 01.33 | 13.53 | 02.33 | 14.53 | 10.08 | 22.29 | 09.08 | 21.29 | — | 12.08 | 00.48 | 13.08 | 11.38 | 23.59 | 00.33 | 12.53 |
| 6. juli | 00.14 | 12.35 | 11.35 | 23.56 | 11.50 | — | 02.14 | 14.35 | 03.14 | 15.35 | 10.50 | 23.11 | 09.50 | 22.11 | 00.29 | 12.50 | 01.29 | 13.50 | — | 12.20 | 01.14 | 13.35 |
| 7. juli | 00.56 | 13.31 | — | 12.31 | 00.11 | 12.46 | 02.56 | 15.31 | 03.56 | 16.31 | 11.46 | — | 10.46 | 23.21 | 01.11 | 13.46 | 02.11 | 14.46 | 00.41 | 13.16 | 01.56 | 14.31 |
| 8. juli | 02.06 | 14.42 | 01.06 | 13.42 | 01.21 | 13.57 | 04.06 | 16.42 | 05.06 | 17.42 | 00.21 | 12.57 | 11.57 | — | 02.21 | 14.57 | 03.21 | 15.57 | 01.51 | 14.27 | 03.06 | 15.42 |

5 707265 100050 >